# Nógvur roykur men lítil skaði



Sjálvt um roykurin var nógvur, var eldurin umborð á Reysmúla fyrrapartin í gjár avmarkaður.

Mynd: Eyðun Klakstein

**Fyrrapartin í gjár kom eldur í útróðrarbátin Reynsmúla, sum lá við bryggju í Klaksvík. Sløkkiliðið var skjótt á staðnum og basti eldinum**

ELDUR
*Kári Mikkelsen*
*karm@sosialurin.fo*

Eldurin umborð á Reynsmúla er sambært sløkkiliðsleiðaranum, Finni Hansen, kyknaður aftalaga í skúrinum á bátinum, har sum kabússin er.

Fráboðanin um eldin kom klokkan 10.59 fyrrapartin í gjár, og tað tók bert fýra minuttir, til sløkkilið var á staðnum. Sjálvt um tað var nógvur roykur, so var eldurin ikki stórur, og sløkkiliðið fekk lutfalsliga lættliga bast eldinum.

- Vit brúku hátrýst, og tað tók ikki langa tíð at fáa støðuna undir kontrol, sigur Finn Hansen.

Skaðin er ikki uppgjørdur, men sløkkiliðsleiðarin metir ikki, at talan er um serliga stóran skaða.

- Nakað av roykdálking er sjálvandi, men útyvir tað, sær tað ikki út til at vera serliga umfatandi, sigur Finnur Hansen.

Reynsmúli, sum er 49,30 bruttotons til støddar, er bygdur úr eik í Esbjerg í 1960, og varð keyptur til Klaksvíkar í 1986. Tað er smápartafelagið Reynsmúli, ið eigur útróðrarbátin. Útgerðarmaður er Hjálmar Arnold Højgaard.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og um kvøldið regn. Hitin kemur upp millum 5 og 8 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av vestri, seinnapartin nakað minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av suðri og seinnapartin regn . Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn, leygardagin hækkar hann upp í landnyrðing og ælingur. partvís kavi. Hitin millum 3 og 7 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -7 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | - |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 18 |
| Athen | -- |
| Malta | 16 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 24 |
| Sydney | -- |
| New York | 7 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer í landsynning.



**Í dag:**
Hátrýstið í útsynning úr Írland stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Føroya fer eystureftir.Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týskvøldið

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/2 kl. $06^{00}$ – 26/2 $06^{00}$. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í mars: -11° - Mesti hiti máldur í mars: 11°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 25/2 kl. $06^{00}$ – 26/2 $06^{00}$.
Avfallið higartil í mars: 95 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 28. feb. | Mánin longst frá jørðini |
| 29. feb. | Seinna kvarter |
| 7. mars | Tendring |
| 10. mars | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. mars | 03.15 | 15.39 | 02.15 | 14.39 | 02.30 | 14.54 | 05.15 | 17.39 | 06.15 | 18.39 | 01.30 | 13.54 | 00.30 | 12.54 | 03.30 | 15.54 | 04.30 | 16.54 | 03.00 | 15.24 | 04.15 | 16.39 |
| 4. mars | 04.01 | 16.24 | 03.01 | 15.24 | 03.16 | 15.39 | 06.01 | 18.24 | 07.01 | 19.24 | 02.16 | 14.39 | 01.16 | 13.39 | 04.16 | 16.39 | 05.16 | 17.39 | 03.46 | 16.09 | 05.01 | 17.24 |
| 5. mars | 04.46 | 17.08 | 03.46 | 16.08 | 04.01 | 16.23 | 06.46 | 19.08 | 07.46 | 20.08 | 03.01 | 15.23 | 02.01 | 14.23 | 05.01 | 17.23 | 06.01 | 18.23 | 04.31 | 16.53 | 05.46 | 18.08 |
| 6. mars | 05.29 | 17.50 | 04.29 | 16.50 | 04.44 | 17.05 | 07.29 | 19.50 | 08.29 | 20.50 | 03.44 | 16.05 | 02.44 | 15.05 | 05.44 | 18.05 | 06.44 | 19.05 | 05.14 | 17.35 | 06.29 | 18.50 |
| 7. mars | 06.11 | 18.32 | 05.11 | 17.32 | 05.26 | 17.47 | 08.11 | 20.32 | 09.11 | 21.32 | 04.26 | 16.47 | 03.26 | 15.47 | 06.26 | 18.47 | 07.26 | 19.47 | 05.56 | 18.17 | 07.11 | 19.32 |